gult2 cyan2 magenta2 svart2



# Týdningarmikið við útbúgving

**Tað er umráðandi at hava vitan um arbeiðið við autistum, skal tað bera til at menna teir og betra um teirra gerandisdag, sigur danskur skeiðhaldari frá Center for Autisme**

AUTISMA
*Eyðun Klakstein*

**Viðareiði**: Fyrst í vikuni vóru 23 fólk, sum hava við autistar at gera, á skeiði, sum Lennart Pedersen frá Center for Autisme í Danmark helt á Hotel Norð.

Á skeiðnum var nógv gjørt burtur úr teimum møguleikum, sum eru at menna autistar og at betra teirra gerandisdag.

– Tað ber til at hjálpa autistum, so teir gerast meiri sjálvbjargnir og fáa betri samband við onnur fólk, sigur Lennart Pedersen.

– Summir autistar gerast verri fyri enn neyðugt, tí teir fáa ikki røttu viðferðina og viðgerðina. Tað er umráðandi at hava vitan um, hvussu tað skal arbeiðast við hesum fólkum, sigur hann.

### Mugu hava neyva skrá

Ein av teimum, sum hevur verið á skeiðnum, er Sonja Laksáfoss, sum er leiðari fyri Sambýlinum í Runavík.

– Tað er lættari at hava við autistar at gera, um tú hevur eina góða skipan sum grundarlag. Tað hevur stóran týdningar fyri autistar, at teir allatíðina vita, hvat er á skránni, tí gera teir ikki tað, so koma trupulleikarnir, sigur hon.

– Tað er gott fyri okkum at koma á eitt slíkt skeið sum hetta, tí vit verða inspirerað og kunnu fylgja við, hvat hendir á økinum, heldur Sonja Laksáfoss.

Hon heldur, at tað eru nógv góð hugskot at taka heim við av skeiðnum.



*Lennart Pedersen frá Center for Autisme og Sonja Laksáfoss, leiðari fyri Sambýlinum í Runavík*

### Vita ikki av tí

Tað er ymiskt, hvussu autistar eru fyri. Summir eru menningartarnaðir, meðan aðrir ikki eru tað, og tey, sum fyrst og fremst hava trupulleikar við at samskifta og fyrihalda seg móti øðrum fólki, líða undir tí, sum tey kalla Asbergersyndromið.

Lennart Pedersen heldur, at tað finnast nógv fleiri autistar í føroyska samfelagnum, enn fólk geva sær far um.

– Tað verður sagt, at trý promillu av fólkinum eru autistar, men øll vita ikki av tí. Summi fólk, sum verða mett sum serlig ella løgin, kunnu hava autismu, sigur hann.

– Hagtalsliga kunnu vit siga, at um vit fóru inn í skúlarnar í Føroyum, so høvdu vit funnið fleiri autistiskar næmingar, sum ikki verða roknaðir sum autistar, sigur Lennart Pedersen.

Hann heldur, at autistar í Føroyum hava nógv góð tilboð, men hann saknar eitt skúlatilboð, sum veruliga leggur seg eftir at menna og undirvísa autistum.

# Vit gleða okkum til summarið

**Í dag letur Hotel Norð uppaftur, og nógv verður at gera næstu mánaðirnar. Egga Heinesen, sum rekur hotellið, gleðir seg til summarið**

HOTEL
*Eyðun Klakstein*



*Egga Heinesen er kokkur og ein av teimum, sum rekur Hotel Norð á Viðareiði*

**Viðareiði**: Nú letur Hotel Norð á Viðareiði uppaftur, og næstu mánaðirnar verður nógv at gera á hotellinum.

– Vit gleða okkum til summarið, og tað er sera hugaligt at lata uppaftur, sigur Egga Heinesen, sum er ein av teimum, sum rekur hotellið.

Hann er eisini kokkur, og hansara uppgáva er fyrst og fremst at standa fyri matinum. Hann hevur staðið í læru á Hotel Hafnia, og hann tók fyri kortum prógv við rós.

– Mær dámar væl at gera mat, sjálvt um tað við hvørt kann verða eitt sindur keðiligt, tá sólin bakar niður uttanfyri, sigur hann.

### Mølin letur upp

Hotel Norð liggur í friðarligum umhvørvi á Viðareiði, og um summarið vitja bæði føroyingar og útlendingar. Næsti granni hjá hotellinum er ein graslíkisvøllur.

Á norðoyastevnu fer Hotel Norð at gera nógv burturúr. Fríggjakvøldið í næstu viku verður stórur veitsludøgurði, og ætlanin er at selja atgongumerki til hendan døgurðan í forsølu á hotellinum og í Klaksvík.

Seinni verða eisini onkur serlig kvøld, har hotellið fer at gera okkurt serligt burturúr.

Nú hotellið letur uppaftur, verður eitt nýtt høli, sum teir rópa Mølin, smíðað, og tað letur upp á norðoyastevnu.

# Fólk frá Baren vitja Platform




**Nýggja dansistaðið Platform letur upp í Havn í kvøld. Næsta vikuskiftið koma fólk frá sjónvarpsrøðini, Baren, á vitjan í Platform**

DISKOTEK
*Eyðun Klakstein*

Nú ber til at fara í oljudans í Havn. Nýggja diskotekið, Platform, letur upp í kvøld, og hetta dansistaðið brúkar oljuvinnuna sum konsept.

Platform fer at halda til í bygninginum hjá Havnar Klubba, og tá hurðarnar verða latnar upp í kvøld, verða fólk boðin inn í eitt eksklusivt stað, har nógv verður gjørt burtur úr innbúgvi, umhvørvi og hugna.

Í sambandi við at Platform letur upp, fer rockbólkurin, All that Rain, at spæla í kvøld og í annaðkvøld.

Næsta vikuskiftið verða útlendskir gestir í Platform. Christian og Michael, sum er kendur frá sjónvarpsrøðini Baren koma til Føroya, og teir fara at hava show í Platform hóskvøldið 7. og fríggjakvøldið 8. juni.

Málbólkurin hjá nýggja dansistaðnum eru fólk fyrst í 20'unum og eldri.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at

**JANUS POULSEN**
**ættaður av Sandi**

andaðist mikudagin 30. mai 2001, 80 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum leygardagin 02. juni kl. 14.00.

Fyri tey avvarðandi
**Grethard Poulsen**

gult3 cyan3 magenta3 svart3







